## Skeiðsdepilin



**Skeið í reingerð**
*ÚTSETT*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein

**Buffét**
*ÚTSETT*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff

**Steinseting**
*16. – 20. okt.*
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad innleiðsla**
*19. – 20. okt.*
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad grundskeið**
*26. – 27. og 30. – 31. okt.*
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

**Beton armering**
*30. okt. – 3. nov.*
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, stødlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

**Innleiðsla í sveising**
*6. – 17. nov.*
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

**Make Up skeið**
*Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.*
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813

# Føroyar til próvtøku í ST um diskriminatión av kvinnum

JAVNSTØÐA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Mikudagin 9. august var Danmark til próvtøku í ST fyri at verja frágreiðing sum Danmark letur ST fjórða hvørt ár um, hvat myndugleikarnir gera fyri at seta í verk CEDAW-sáttmálan. Við vóru eisini ríkspartarnir Føroyar og Grønland. CEDAW er stytting fyri Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women. Partur av hesari frágreiðing er um javnstøðuviðurskiftini í Føroyum, og um tvær vikur væntast úrslitið av próvtøkuni, har ST-nevndin kemur við úrskurðinum og tilráðingum.

Í føroyska upplegginum varð víst á, at í føroyskari løggávu eru ikki formligar forðingar fyri javnstøðu millum kvinnur og menn. Lógin ger ikki mun á kvinnum og monnum, men tryggjar øllum borgarum í Føroyum somu rættindi. Tó eru kvinnur enn ein minniluti á teimum økjum, har politiskar avgerðir verða tiknar og eisini innan leiðandi størv í samfelagnum.

**Gender mainstreaming**

Sum støðan er í dag, eru um 10% av løgtingslimunum kvinnur. Í landsstýrinum er eingin kvinna og aðalráðini eru øll mannaði við mannligum stjórum, uttan løgmansstjórin, sum er kvinna. Í 2004 vóru 57 stovnar undir landsfyrisitingini, harav høvdu 8 av stovnunum kvinnuligan stjóra.

Føroyska umboðið greiddi tó frá, at landsstýrismaðurin í javnstøðumálum arbeiðir við hesum mismuni, og hevur sett eina tvørpolitiska nevnd, sum skal arbeiða fyri at fáa fleiri kvinnur í politikk.

Úr Vinnumálaráðið verður sagt, at Føroyska umboðið, Kitty May Ellefsen, fekk nógvan íblástur til, hvat Føroyar kunnu gera fyri at menna javnstøðuna millum kynini í Føroyum, harímillum sokallaðum gender mainstreaming, hvørs endamál er at fremja javnstøðu millum kvinnur og menn við at hava javnstøðu- og kynsperspektivið við í øllum politiskum arbeiði, planlegging og umsiting. Landsstýrismaðurin í javnstøðumálum, Bjarni Djurholm, er farin undir at arbeiða við gender mainstreaming í Føroyum.

# 12 føroyskar fyritøkur á ONS í Stavanger

**Tá ONS 2006 framsýningin lat upp í morgun kl 9 í Stavanger stóðu 12 føroyskar fyritøkur klárar á føroyska landabásinum**

OLJUMESSA

Tað eru Oljuvinnufelagið og Menningarstovan, ið samskipa føroysku luttøkuna. Petur & Petur hava staðið fyri básgerðini og øðrum praktiskum í hesum sambandi

Luttakandi fyritøkurnar eru Thor, Virkisráðgeving, Tor Shipping, Beras, PAM Offshore, Vága Floghavn, Kemilux, Syntesa, Atlantsflog, Faroe Ship, Tórshavnar Havn, Oilwind og Simprentis. Flestu teirra hava longu sum er góð sambond í oljuvinnuni og við fyritøkur, sum veita tænastur til oljuvinnuna. men annars verða ymisk tiltøk, ið kunnu vekja enn størri áhuga fyri Føroyum og føroysku tænastuvinnuni. Eitt nú verður móttøka umborð á Westward Ho hósdagin kl. 15, og tvær ferðir um dagin verður kappast á føroyska básinum í Explore spælinum hjá Simprentis.

Fyritøkurnar vænta góða vitjan á føroyska básinum.

# PCB í føroyskum børnum fær vaksinatiónsverjuna at vikna

**Kanningar á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu týða uppá, at umhvørviseitur, so um PCB, kunnu tálma virknið í immunskipanini hjá børnum. Hetta stendur í eini grein, sum verður almannakunngjørd í dag, týsdagin 22. august, í tíðarritinum Public Library of Science Medicine**

HEILSA

Kanningarúrslitini eru grundað á kanningar av børnum, fødd í 1994 og 1995, og sum eru vorðin kannað regluliga, heilt frá nýføðingum, og nú seinast sum tíggju ára gomul. Hetta kanningarúrslitið vísir, at PCB minkar um tey andevni, sum ætlanin er, at vaksinatiónin skal elva til. Tá børnini vóru 18 mðr. gomul, var ein týðilig minking í andevnisnøgdini í blóðinum, jú hægri PCB í blóðinum var. Her var talan um andevni fyri difteritis. 7 ára gomul vístu andevni móti stívkrampa tað sama, nevniliga minkandi mongd av andevnum, jú hægri útsetilsið fyri PCB hevði verið í móðurlívi.

Kanningin er grundað á rættiliga fá børn, 129 í tali. Til tess at fáa størri vissu fyri, at úrslitini eru eftirfarandi, er ein nýggj verkætlan í gongd á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, har ið andevnini og dálkingarevnini verða kannað hjá á leið 600 børnum um 5 ára aldur. Úrslit frá hesi kanning er tó enn ikki til skjals.

Um tað vísir seg, at niðurstøðurnar í kanningini eru eftirfarandi, kann tað hava týdning fyri immunverjuna sum heild hjá børnum. Í nógvum samfeløgum, serliga umkring Norðurpólin, er útsetilsið fyri PCB og onnur lívrunnin eiturevni stórt. Hetta merkir, at sjálvt um tálmingin av immunskipanini er lítil, kann árinið á fólkaheilsuna samanumtikið verða stórt.

Granskingararbeiðið er fíggjað við peningi frá amerikanska National Institut for Environmental Health Sciences, The US Environmental Protection Agency, Læknavísindaliga Granskingarráðnum í Danmark og Danska Umhvørvisstýrinum. Granskingarverkætlanin er farin fram í einum samstarvi við Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn, Syddansk Universitet, Harvard School of Public Health og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, sigur Pál Weihe, yvirlækni

## Nýggjur prestur til Klaksvíkar

**Nú verður søkt eftir nýggjum presti til Norðoya vestara prestagjald**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Fríggjadagin kunngjørdi danska kirkjumálaráðið, at søkt verður eftir nýggjum presti til Norðoya vestara prestagjald. Hesin skal avloysa Hans Eiler Hammer, sum herfyri varð loystur úr embætinum.

Starvið er lýst leyst frá 1. september, men freistin at søkja er 4. september kl. 15.